# Frítíðarskúlin í Sørvági

**søkir eftir einum deildarleiðara at byrja 16. august 2004**

Frítíðarskúlin, sum er ein deild undir barnagarðinum Sýslan í Sørvági, søkir eftir einum deildarleiðara at arbeiða 35 tímar um vikuna.

Deildarleiðarin, sum skal hava námsfrøðiligt prógv, hevur ábyrgdina av tí dagligu leiðsluni á frítíðarskúlanum.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til Borgarhjørt Larsen, varaleiðara tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera okkum í hendi seinast 10. juni 2004.

**Barnagarðurin Sýslan**
FO-Sørvágur

# Fuglafjarðar skúli

**Skúlastýrisval týsdagin 25. mai**

Val av foreldraumboðum í skúlastýrið fyri Fuglafjarðar skúla verður **týsdagin tann 25. mai 2004 frá kl. 14 til kl. 20 í stovu 209** (uppgongd sunnan fyri svimjihøllina). Møguligar brævatkvøður skulu latast inn í seinasta lagi kl. 18 dagin fyri valdagin!

**Valevnislisti:**
1. Lillian Johannesen, Fuglafjørður
2. Sonja á Líðarenda, Norðragøta
3. Uni Næs, Fuglafjørður
4. Hans Jacob Poulsen, Kambsdalur, Fuglafjørður
5. Palli Vang, Fuglafjørður

**f. Valnevndina**
**Súni í Hjøllum, skúlastjóri**
Tlf. 444087 og Tlf. 214087

# Hølir í Tórshavn til leigu

Hølir sum eru vælegnað til skrivstovu, ráðgevingarvirksemi og annað.

Hølini er uml. 100 $m^2$ og er møguleiki fyri at víðka til 200 $m^2$. Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er høli 200 $m^2$/1400 CBM, ið er vælegnað til goymslu, ídnað og annað virksemi. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í hølinum.

Sera gott útsýni og tætt við høvuðsveg.

**Sosialurin**
**Box 76 · FO-110 Tórshavn**
**Bill.mrk. 609**

**Almanna- og heilsumálaráðið**

# Leiðari og starvsfólk til nýggjan Bústovn fyri børn og ung

Almanna- og heilsumálaráðið hevur avgjørt at seta á stovn ein serligan samdøgursstovn fyri børn og ung í aldrinum 13 til 18 ár. Í hesum sambandi verður søkt eftir leiðara og starvsfólkum til stovnin.

**Leiðari og starvsfólk:**
Søkt verður eftir leiðara og 5 starvsfólkum til samdøgursstovnin.

Leiðarin kemur at hava fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.
Týðandi parturin av arbeiðinum hjá leiðaranum er samstarvið við aðrar myndugleikar s.s barnaverndarnevndir, skúlamyndugleikar, heilsuverkið, umframt onnur fakfólk.

Stórur dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður sum leiðari hevur góð samstarvsevnir, gott áræði og dugir at ganga nýggjar leiðir og dugir at samstarva við ymsar fakbólkar. Eisini verður dentur lagdur á, at leiðarin hevur góð leiðsluevni og saman við starvsfólkunum dugir at skapa eitt trygt og mennandi umhvørdi, fyri tey sum koma at búgva á stovninum.

Til starvið sum leiðari krevst útbúgving sum sálarfrøðingur, pedagogur, sosialráðgevi ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á, at leiðarin hevur leiðsluroyndir.

Til størvini sum starvsfólk krevst útbúgving sum pedagogur, sosialráðgevi ella líknandi. Starvsfólkini koma saman við leiðaranum at fyriskipa og menna tað pedagogiska arbeiðið í tøttum samstarvi við avvarðandi myndugleikar.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Súsonnu Nolsøe, tlf. 304050 í Almanna- og heilsumálaráðnum.

**Umsóknarfreistir:**
Umsókn, próvskjøl og C.V. skulu vera Almanna- og heilsamálaráðnum í hendi soleiðis:

Umsóknir til leiðarastarvið í seinasta lagi 7. juni 2004 kl. 12:00
Umsóknir til onnur størv í seinasta lagi 21. juni 2004 kl 12:00

**Almanna- og heilsmálaráðið**
Eirargarði 2
FO-110 Tórshavn

Sosialurin
-tað loysir seg

# Almannastovan

# Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki. Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv. Arbeiðið fevnir m.a. um:

**Fylgjarauppgávur**
**Stimbran**
**Umlætting**

Størvini eru hesi:
**Eysturoy**
1. At stuðla og hjálpa einum 8 ára gomlum fjølbrekaðum drongi og fara við honum til viðgerð og onnur tiltøk. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum. Arbeiðið verður gjørt við tilknýti til Tilhaldið í Rók í Saltnesi. Tímatalið er fyribils 25 tímar um vikuna og játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04. Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.
2. At stuðla og stimbra við venjingum og spæli einum 7 ára gomlum drongi. Arbeiðið verður gjørt við tilknýti til Tilhaldið í Rók í Saltnesi. Tímatalið er 20 tímar um vikuna og játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04.
3. At stuðla og hjálpa einum 9 ára gomlum fjølbrekaðum drongi og fara við honum til viðgerð og onnur tiltøk. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum. Arbeiðið verður gjørt við tilknýti til Tilhaldið í Rók í Saltnesi. Tímatalið er 32 tímar um vikuna og játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04. Ynskiligt er at tann, ið settur verður, hevur koyrikort.
4. At stuðla, hjálpa og fara við eini 12 ára gamlari gentu til ymisk frítíðartiltøk. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá gentuni. Tímatalið er 10 tímar um vikuna og játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04.
5. At stuðla og stimbra við venjingum og spæli einum 8 ára gomlum drongi. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum og er í Frítíðaransingini í Fuglafirði. Tímatalið er 28 tímar um vikuna og játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04.

**Norðoyggjar**
6. At stuðla og stimbra einum 11 ára gomlum drongi við venjingum og spæli. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum. Tímatalið er 30 tímar um vikuna og játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04.

**Tórshavn**
7. At stuðla og stimbra einum 10 ára gomlum drongi, og virka til at hann fær ein innihaldsríkan gerandisdag við ymiskum frítíðartiltøkum. Arbeiðið er aftaná skúlatíð hjá dronginum. Neyðugt er at tann, ið settur verður, hevur bil. Tímatalið er 25 tímar um vikuna og játtanin er fyribils galdandi til 31.12.04

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelagi mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Brekdeildina á tlf. nr. 353510 gerandisdagar millum klokkan 9 - 15.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu vera

**Almannastovuni**
J. Broncksgøta 27 · Postboks 3096 ·110 Tórshavn

í hendi í seinasta lagi 06.06.04.

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.**



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar dagrøktarskipanina, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Býlingshúsið undir Brúnni**
Á stovninum er ein vøggustova við 10 børnum og tvær barnagarðsstovur við 17 og 20 børnum. Trý og fýra starvsfólk eru í hvørjari stovu.

**Lítliskógur**
Á stovninum eru 6 stovur, 2 vøggustovur, 3 barngarðsstovur og 1 skúlastova. Tilsamans ganga 94 børn á stovninum og 29 starvsfólk starvast har.

**Stella Maris vøggustova**
Á stovninum eru fýra vøggustovur við 11 børnum á hvørjari. Fýra starvsfólk eru á hvørjari stovu.

www.torshavn.fo

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Býlingshúsið undir Brúnni eftir:**
- einum pedagogi at arbeiða 35 tímar um vikuna í vøggustovuni, at byrja 14. juni 2004 ella eftir nærri avtalu
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í barnagarðinum, at byrja 1. august 2004 ella eftir nærri avtalu

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum undir Brúnni í hendi innan **týsdagin 8. juni 2004.**

Leiðari: Turið Horn, tlf. 319180
Smærugøta 9 b
100 Tórshavn

**Lítlaskóg eftir:**
- einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna á barnagarðsstovu, við seks ára gomlum børnum, at byrja 15. august 2004 ella eftir nærri avtalu
- einum pedagogi at arbeiða 20 tímar um vikuna á barnagarðsstovu, við seks ára gomlum børnum, at byrja 15. august 2004 ella eftir nærri avtalu

Størvini eru tíðaravmarkaði, fyribils í eitt ár

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Lítlaskógi í hendi innan **mikudagin 2. juni 2004.**

Leiðari: Frígerð Sundsskarð, tlf. 319131
Djóna í Geilgøta 51
100 Tórshavn

**Stellu Maris eftir:**
- einum varaleiðara at arbeiða 40 tímar um vikuna, at byrja 11. august 2004 ella eftir nærri avtalu
- tveimum pedagogum at arbeiða 30 tímar um vikuna, at byrja 11, august 2004 ella eftir nærri avtalu
- einum pedagogi at arbeiða 25 tímar um vikuna, at byrja 11. august 2004 ella eftir nærri avtalu

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Stellu Maris i hendi innan **mánadagin 18. juni 2004.** Viðmerk brævbjálvan "pedagogar til Stella Maris vøggustovu"

Leiðari: Kristina Eldevig, tlf. 312853
Varðagøta 11
100 Tórshavn

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran, ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.




TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnuri í Kaldbak**
Nýggi dagstovnurin í Kaldbak er normeraður til 32 børn í aldrinum 0-10 ár.

Nýggi stovnurin verður tann fyrsti av sínum slag í Tórshavnar kommunu, hetta er fyrsti stovnur við børnum í aldrinum 0 - 10 ár.

www.torshavn.fo

## Leiðari til Dagstovnin í Kaldbak

Tórshavnar kommuna søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna til nýggja dagstovnin í Kaldbak, at byrja 1. juli 2004 ella eftir avtalu.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert starv har tú fært møguleika at seta tín dám á stovnin
- møguleika fyri ráðgeving
- møguleika fyri eftirútbúgving

**Vit vænta at umsøkjarin**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir ( er fyrimunur)
- kann arbeiða sjálvstøðug, og taka avgerðir
- hevur hollan ástøðiliga vitan
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag merktan av virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta, bæði innan og uttanhýsis
- sær møguleikar framum vansar
- er opin fyri møguleikum bygnaðarbroytingum innan økið
- hevur teldukunnleika

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, samskipara ella Gunnleyg Durhuus, trivnaðarstjóra tlf. 315160

**Umsókn**
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi innan mánadagin 7. juni 2004.

## TÍN ÚTBÚGVING TÍN FRAMTÍÐ



***Nýggjur útbúgvingarmøguleiki***

**FHS sum fjarlestur**

| | |
|---|---|
| ∉ **útbúgving:** | **FHS-stakgreinir sum fjarlestur**<br>**Møguleiki fyri FHS-prógvi uppá 2 ár** |
| ∉ **upptøkutreytir:** | **nøktandi 9./10. floks prógv** |
| ∉ **umsóknarfreist:** | **4. juni** |

Hevur tú spurningar í sambandi við útbúgvingina, ert tú vælkomin at seta teg í samband við skúlan á 444 900 ella fh@kambsdal.olivant.fo.

Umsóknarblað fæst við at venda sær til skúlan. Eisini er nærri kunning og umsóknarblað at finna á www.fh.fo.

∉ Kambsdalur
∉ 444 900
∉ fh@kambsdal.olivant.fo
∉ www.fh.fo

FØROYA HANDILSSKÚLI